

## Dubbulthús í Tórshavn
### – Bóndaheygur 4

Snotislig og sera vælhildin dubbulthús verða hervið lýst til sølu.

Húsini eru bygd úr betong og eru í trimum hæddum.

**Byggiár:** 1999 **Grundøkið er til víddar:** 326 m²

**Húsini eru til støddar:** Miðhædd: 80 m²
Loftshædd: 55 m²
Kjallari: 80 m²

**Húsini eru innrættað soleiðis:**

**1 hædd:** Stór gongd við trappu uppá loft, toílett/bað, stova og køkur út í eitt og bryggers

**Loftshæddin:** Gongd, 2 kømur, sjónvarpsstova og toilett/bað.

**Í kjallaranum** er ein íbúð uppá umleið 50 m² sum er innrættað soleiðis: Gongd, 2 kømur, stova/køkur, toilett/bað og kjallararúm uppá umleið 30 m².

Gott útsýni er av loftinum.

Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



## Sethús í Tórshavn
### – Fugloyarveg 4

Húsini sum eru ný ístandgjørd og í sera góðun standi.

Tey standa í friðaligum umhvørvi við góðum útsýni og við vøkrun urtagarði rundanum.

Húsagrundin er úr betong. Miðhæddin bygd úr múrsteini.

Húsini er í 2 hæddum, miðhædd og kjallara.

**Byggiár:** 1979 **Grundøkið er til víddar:** 795 m²

**Húsini eru til støddar:** Veghædd: 156 m²
Kjallarahædd: 20 m²

**Húsini eru innrættaði soleiðis:** Durur og gestatoilet, gongd, køkur, bryggers, stór stova uttanfyri terassa, hjúnarkamar og 3 kømur og toilett/bað.

Kjallarin hevur 2 hobbyrúm

Til húsini hoyrir somuleiðis garaga, sum er umleið 24 m² og ein hjallur sum er 15 m².

Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.

Heygum & Petersen
advokatskrivstova

Advokatskrivstovan hjá
Bjørn á Heygum & Alfred Petersen

Bøgøta 16 | postboks 164 | FO-110 tórshavn
Tlf. 351710 | fax 351711 | hp@adv.fo | www.adv.fo

Runavíkar
Kommuna
søkir eftir

## Starvsfólki til Barnagarðin á Mýrunum

**Søkt verður eftir:**
- 2 pedagogum 30t/35t um vikuna, til vøggustovrunar
- 2 pedagogum 30t/35t um vikuna, til barnagarðstovurnar

**Førleikakrøv:**
vit sóknast eftir starvsfólki, ið eru nýhugsandi og ígongdsetandi og eru opin, jalig, duga at veita umsorgan og hava góð samstarvsevnir. Vit ynskja, at tú, í tøttum samstarvi við starvsfelagar og foreldur, kann skapa ein fjølbroyttan, mennandi og tryggan dag fyri hvørt einstakt barn.

**Vit bjóða tær:**
eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum avbjóðingum í dagligdegnum, har tú verður ein partur av okkara breiða starvsfólkahópi, har tað námsfrøðiliga arbeiðið verður raðfest høgt. Dentur verður lagdur á, at møguleiki er fyri fakligari og persónligari menning.

Størvini verða sett 17. august 2009 ella eftir nærri avtalu. Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Eyðnu Norðfoss, leiðara ella Jastrid Weihe, varaleiðara á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. juni 2009, kl. 12.00.

*Runavíkar Kommuna*
*Heiðavegur 26*
*Postrúm 139*
*FO-610 Saltangará*

Í Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur, 3 barnagarðsstovur og 1 stova til børn við serligum tørvi. Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felags/ rørslurúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið.

# KAPPRÍÐING

Kappríðing verður við Leynavatn
leygardagin 20. juni kl. 15.00.

Tilmelding seinast týskvøldið 16. juni kl. 19.00

**Ring: 211789 – 263239 – 528151**



**FØROYA RÍÐINGARFELAG**

FØROYA PEDAGOG FELAG

## Starvsfólk til Føroya Pedagogfelag

**Høvuðsuppgávur**
- At tak lut í dagliga arbeiðinum í felagnum
- Røkja nýggja journalskipan
- Avgreiða dagligar sáttmála- og lønarspurningar
- Veita limum ráð og vegleiðing
- Allar fyrifallandi uppgávur

**Førleikakrøv**
- Fyrisitingarligar royndir
- Góðan telduførleika
- Kann verða ein fyrimunur, at viðkomandi hevur eftirútbúgving á fyrisitingarliga økinum og kunnleika til lógararbeiði ella hevur arbeitt við lógararbeiði

**Lønar- og setanartreytir**
Løn smb. avtalu – Eisini góðir møguleikar fyri umflokking við tíðini.

**Arbeiðstíð**
Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna – Møguleiki er fyri eitt sindur styttri arbeiðsviku.

**At byrja** 1. sept. 2009 ella eftir nærri avtalu

**Felagið**
Vit eru eitt fakfelag í støðugum vøkstri og hava tí brúk fyri fleiri starvsfólkum.

Arbeiðið er sera spennandi, tá arbeiðsuppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar.

Vit leita tí eftir fólki, ið kann taka hond í við øllum uppgávum í felagnum.

Tú verður partur av einum fyrisitingarligum toymi.

Í starvi ídag eru formaðurin, fyristingarleiðari og bókhaldari

**Umsókn skal sendast til:**
Føroya Pedagogfelag
Postsmoga 318
Tlf. 31 75 76
110 Tórshavn

Umsóknin skal verða send felagnum í seinasta lagi 1. juli 2009

Merkið brævbjálvan: »Umsókn«.

# SUMMARFRÍ

**Vegna summarfrí í juli mánaða, verða bert átrokandi arbeiði gjørd.**

***Palli á Dul***
*Løggildugt el-innleggjaraviki*
*Tel. 218091 - 211789*